VÁGATUNNILIN

**Vágatunnilin p/f**
**Skansavegur 7**
**Postboks 1010**
**FO-110 Tórshavn**

**Tel +298 350200**
**Fax +298 350201**
**www.vagatunnilin.fo**

# Frágreiðing til aðalfundin 6. juni 2002

**(fyri árið 2001)**

Til ársaðalfundin tann 6. juni 2002, er fylgjandi greitt:

- tunnilin varð skotin ígjøgnum tann 10. januar 2002. Síðani tá er tunnilin liðugt tryggjaður við boltum og sprændum betong og fyribils vegbreytin í tunlinum skift, Arbeitt verður við at leggja drenrør, pumpirør, dragirør og at sera neyðugu brunnarnar í hesum sambandi.
- tað líður væl við írestandi vegagerðini. Arbeitt verður við íbindingini oman fyri Fútaklett og við rundkoyringini við Leynar. Uppseting av vegastokki og asfaltarbeiði v.m. verður framt av Landsverkfrøðinginum.
- arbeiðsstøðan viðvíkjandi tunnilsgerðini er nakað framman fyri tíðarætlanina. Heldur gongdin fram, kann væntast, at tunnilin verður opin fyri ferðslu miðskeiðis í februar 2003.
- jarðfrøðisligu viðurskiftini mugu samanumtikið sigast at hava verið betri enn væntað, við tað at rivuløgini vóru færri og ikki so umfatandi, sum roknað var við.
- Samlaði lekin í tunnlinum er umleið 100 l/min/km, ið er gott 30% av loyvda lekanum uppá 300 l/min/km.
- roknað verður við at tunnilin kann latast upp fyri ferðslu í februar 2003.
- sáttmáli er gjørdur um elarbeiði.

## 1. Nevndin og felagið

Nevndin hevur í 2001 havt 7 fundir og 7 fundir higartil í ár.

Nevndin hevur síðani apríl 1999 havt 5 limir.

Á seinasta aðalfundi var øll nevndin afturvald.

Felagið hevur egna skrivstovu í leigaðum hølum á Skansavegi 7.

Starvsfólkini hava í 2001 verið 3 í tali umframt stjóran. Av hesum hava 2 verið knýtt til dagliga eftirlitsarbeiðið.

Partapeningurin var seinast hækkaður á eykaaðalfundi 15. januar 2002, so at partapeningurin nú er 100,3 mió kr.

## 2. Virksemi

Felagið hevur í 2001 hildið fram við undirsjóartunnilsgerð millum Streymoynna og Vágoynna. Í høvuðsheitunum hevur arbeiðið fevnt um evnini, ið nærri eru lýst niðanfyri.

**-Tunnilsarbeiðið**

Við ársbyrjan 2001 vóru 634 m av tunli sprongdir frá Leynum. 27. februar 2001 var fyrsta skotið í Vágum latið av, og við árslok vóru 2828 m av tunli sprongdir úr Leynum og 1967 m av tunli sprongdir úr Vágum. Eftir vóru 82 m og var hetta nakað betri enn ætlað.

Til at vegleiða um teknisk viðurskifti og avgreiða ivamál og møguligar ósemjur er skipaður ein referencebólkur mannaður við umboðum fyri arbeiðsánara og arbeiðstakara, og við formanni, ið er góðkendur av báðum pørtum. Referencebólkurin hevur roynst væl og hevur m.a. vegleitt um endaliga trygging í tunlinum og avgreitt ósemju um boltatrygging.

Stutt eftir ársskiftið, tann 10. jan 2002 varð tunnilin skotin ígjøgnum. Hetta varð hátíðarhildið við samkomu í tunlinum, har nevndarformaðurin í felagnum loysti seinasta skoti av. Síðani komu landstýrismaðurin við frúu og løgmaður, sum teir fyrstu gjøgnum tunnilin eystani frá, og vóru møttir av landstýrismanni og tingmonnum úr Vágoyni, við frúum. Um kvøldið var borðhald fyri gestunum.

**- Vegarbeiðið**

Við ársbyrjan 2001 var arbeiðsvegurin á Vágalandinum mest sum komin ígjøgnum og fyrireiking av tunnilsinslagi og byggiplássi á Vágalandinum var komið áleiðis. Við árslok var endaligi vegurin bygdur upp undir áskotið, brúgv gjørd um Marknará eins og skráningar, tvørrennur og seyðasmogur vóru mestsum lidnar. Eftir var at gera svingið oman fyri Fútaklett og bíðaði hetta arbeiðið til veturin var av.

Farið var undir vega- og brúgvagerð í Leynum í november og desember 2001.

Tað hevur víst seg, at vera nakað av muni á sjónarmiðunum hjá byggiharranum og hjá arbeiðstakaranum um ymisk viðurskifti í sambandi við fremjing av arbeiðinum. Málini eru ikki endaliga avgreidd enn. Tað kann ikki enn sigast, um málini verða avgreidd við semju.

**- Fígging**

Íleggingargrunnurin fyri Føroyar veitir fígging til verkætlanina. Síðani arbeiðið fór í gongd og fram til ársenda 2001 eru nýttar 76 mió kr av játtaðu fíggingini.

**- Heilsa, trygd og umhvørvi**

Arbeitt verður við tilbúgvingarætlan fyri Vágatunnilin saman við løgregluni, Landsverkfrøðinginum, Kvívíkar kommunu og Sandavágs kommunu. Til arbeiðið er knýttur ráðgevi við tilbúgvingarligum førleika. Váðagreining er gjørd, ið lýsir møguligar vandar, teirra sannlíkindi og fyribyrgjandi tiltøk.

Kanningar eru gjørdar av vatninum í Leynará, við atliti til møguliga ávirkan á síl og laks í ánni. Kanningarnar bendu á, at sum heild var ávirkanin á ánna sera lítil.

— Ein vanlukka varð í tunlinum tann 14. jan 2002, har ein maskinførari læt lív. Málið varð kannað av løgregluni og arbeiðseftirlitinum. Umstøðurnar bendu á, at hetta var eitt hendiligt óhapp. Áðrenn børan varð send heim, var minningarhald í kirkjuni í Sandavági. Í allari neyðini upplivdu vit stóra samkenslu rundanum okkum.

## 3. Mál av samfelags- og samfelagsbúskaparligum týdningi

Verkætlanin er løgd í eitt sjálvstøðugt partafelag, ið hevur endaligu fíggjarligu ábyrgdina. Sum ásett í anleggslógini er felagnum játtað tilsamans 160,3 mió kr ella 20 mió kr um árið til verkætlanina. Verkætlanin er ein tann størsta á samferðsluøkinum seinastu árini. Lønargjøldini í samlaða arbeiðinum kann metast út frá planleggingarkostnaðinum uppá 240 mió kr, lønarpartinum, ið kann metast til 35-40% og byggitíðini o.u. 3 ár; hetta vil svara til at goldnar verða umleið 30 mió kr um árið í lønum í byggitíðini.

Talið má takast við fyrivarni. Endaliga býtið av kostnaðinum yvir byggitíðina og hvussu stórur partur av kostnaðinum, ið er lønir, velst um hvussu arbeiðstakarin leggur arbeiðið til rættis. Ávirkanin á føroyska búskapin velst eisini um lønmóttakararnir búgva og verða skattaðir í Føroyum.

Ein uppgerð av nýttu arbeiðstímunum við árslok 2001 vísir, at 59% av tímunum eru arbeiddir av fólki búsitandi í Føroyum meðan 41% eru arbeiddir av fólki búsitandi uttan fyri Føroyar. Í hesum tølum eru eisini undirveitarar roknaðir uppí.

**4. Rakstrar og íløguætlan fyri komandi árini**
Rakstrarútreiðslurnar av felagnum vera í byggitíðini væntandi o.u. 1,5-2,0 mió kr um árið.

Tunnilsarbeiðið hevur verið framt skjótari enn upprunaliga mett. Hetta ger at størri partur av íløguni fellur í 2002 enn uppsett í íløguætlanini í ársfrágreiðingini fyri 2000, soleiðis at íløgurnar fyri 2002 veksa úr 70 mió kr upp í 90 mió kr, meðan íløgurnar fyri 2003 minka úr 25 mió kr niður í 5 mió kr.

Mett út frá planleggingarkostnaðinum fyri verkætlanina, ið er 240 mió kr tilsamans, og gjaldsavtalunum, verða íløgurnar so mettar at fella á henda hátt

| **Ár** | **Upphædd mió kr** |
|---|---|
| 2000 | 50 |
| 2001 | 95 |
| 2002 | 90 |
| 2003 | 5 |

Fyribils verður mett, at planleggingarkostnaðurin fer at halda.

Tórshavn 6. juni 2002

Klæmint Weihe, form. Bergur í Garði

Jens Kári Vilhelm Heri M. Hammer

Oyvindur Brimnes